# Soleiðis hongur Havnar Svimjifelag saman:

## *Hesar eru (so nøkulunda) uppgávurnar hjá bólkunum:*

### Stevnubólkurin heima:

Í samband við kappingar í Havn syrgja fyri, at kappingarleiðari verður útnevndur og innbjóðing verður send út*, og møguliga samskifta við útnevnda høvuðsdómaran. (*Kappingarleiðarin kann gott vera í bólkinum*) Biðja hjálparfólk til allar stevnupartarnar, og annars ansa eftir, at nokk av hjálparfólkum eru tøk**.

Í samstarvi við kappingarleiðaran at fyrireika venjara- og hjálparfólkafundir, herundir at útskriva skrá, útflýggja skrá til venjarar. Gera mappurnar til hjálparfólkini klárar, hava stopp-ur, vendiplátur og eyðkennisbúnar til hjálparfólkini klárar. Skaffa fólk til at rigga høllina til og av, skaffa ljóðanlegg, hava ábyrgdina av, at høllin verður latin upp, tá hon skal, og ansa eftir, at hon verður stongd um kvøldið, og at hon verður leverað í sama standi sum vit fingu hana (tó ikki vaska). Hava yvirskipaðu ábyrgdina av, at svimjikappingarnar, sum HS skipar fyri, vera skipaðar og gjøgnumførdar á høgum - og fyri svimjararnar - nøktandi støði.

***Sumt av hesum verður gjørt í samráð við **Kantinubólkinum og *Kappingarskrá-bólkinum.***

### Stuðulsbólkurin:

Í samstarvi við høvuðsvenjara felagsins skipa fyri t.d. stuðulssvimjingin, eins og skipa fyri øðrum tiltøkum fyri at fáa pening til vega til rakstur av felagnum, sum køkutombola, fløskuinnsavning og lutaseðlar, og at finna stuðlar annars.
***MANGLA 2 fólk til hendan bólkin!***

### Svimjiskúlin:

Hava samskiftið við venjarar, húsavørðar og foreldur um hendi, umframt kunning annars. Halda limalistar ajour, evt. gera facebook-bólkar fyri liðini og umsita teir saman við venjarunum. Skipa fyri, at tey á bíðilistanum fáa bjóðað pláss. Hjálpa tilmeldingarbólkinum við uppstartinum. Halda skil á, um limagjaldið verður goldið, o.m.a.

### Ferðabólkur 1:

Skipa fyri øllum í sambandi við luttøku hjá HS 1.-4. lið í 25m- og 50m-svimjikappingum, sum ikki eru í Havn, s.s. ferðing, flutningi, innkvartering, innkeyp og matgerð. Taka ímóti gjaldi frá luttakarunum, og avrokna við kassameistaran. Harafturat syrgja fyri, at minst trý hjálparfólk eru til sjálva svimjikappingina, og at minst fimm foreldur eru at hjálpa til, har svimjararnir eru innkvarteraðir.
***MANGLA 1-2 fólk til hendan bólkin!***

## Kantinubólkurin:

Hava kantinuna um hendi, tá HS skipar fyri svimjikappingum, og hjálpa SSF til FM t.d., og í heila tikið, tá kappingar og líknandi eru í Havn. ***Hjálpa Stevnubólkinum.***

***MANGLA 1 fólk til hendan bólkin!***

## Kappingarskrá- og teldubólkurin:

Gera kappingarskrá til kappingarnar í Havn, senda innbjóðing og gera Grodan-fílu. Hava telduna um hendi, meðan kappingin er í gongd. ***Samstarva við Stevnubólkin.***

***MANGLA 1 fólk til hendan bólkin!***

## Heimasíðubólkurin:

Leggja tilfar út á heimasíðuna, og evt. laga hana til virksemið felagsins

## Svimjikappingarbólkurin úti - 16m:

Til kappingar í 16m hylunum: Syrgja fyri samskiftinum millum venjarar, svimjarar, foreldur. Finna hjálparfólk. Evt. hava eitt foreldur á hvørjum liði/ella bólki, sum kontaktpersón. Alt verður gjørt eftir avtalu við, og í samstarvi við, venjararnar og svimjiskúlabólkin.

## Venjingarlegu-bólkurin:

Í samstarvi við høvuðsvenjara felagsins, skipa fyri øllum í sambandi við árligar venjingarlegur uttanlands, eins og venjingarlegur í Føroyum, harundir bílegging av flogferðaseðlum, innivist og venjingartíðum í svimjihallunum og bílegging av møguligum flutningi millum gistingarstað og svimjihøll, eins og at skaffa leiðarar, ið vanliga eisini eru kokkar, og møguligan hjálparvenjara. *(hetta kann eisini vera partur av liðleiðara-leiklutinum*)

***MANGLA 2 fólk til hendan bólkin!***

## Tilmeldingarbólkurin:

Skipa fyri øllum í sambandi við árligu tilmeldingina, sum er um mánaðarskifti august/september, harundir fyrireika internettilmelding, finna venjarar, syrgja við trygdarskeiðum, umframt bíleggja hallirnar í Eysturskúlanum og Argja skúla. Syrgja fyri faldara at senda til hvørt hús í kommununi. *Alt í samráð við Svimjiskúlabólkin og Rørslubólkin.*

***MANGLA 2 fólk til hendan bólkin!***

## Liðleiðari hjá kappingarliðunum:

Tað er torført at siga heilt ítøkiliga, hvat hetta inniber, men vit hugsa okkum, at tað er at vera millumlið millum foreldur/nevnd og foreldur/venjara um okkurt er áfatt ella um ivamál stinga seg upp. Og at hjálpa venjarunum við ymiskum praktiskum sum t.d. at: skaffa hølir til eyka dryland-venjingar, senda

skrivliga kunning til foreldur/svimjarar, skipa fyri hugnakvøldum, og øðrum tiltøkum, skipa fyri 1 ella 2 foreldrafundum, hjálpa til við at finna hjálparfólk, senda rokningar fyri limagjald, og allarhelst ymiskt annað fyrifallandi. *Sumt av hesum verður gjørt saman við Kantinubólkinum, Ferðabólkinum, Stevnubólkinum v.m.*
**MANGLAR - her kann man evt. hava ein liðleiðara til 1.-2. lið og ein til 3.-4. lið!**

## Ferðabólkur 2: (liðini Blá, Reyð og evt. Grøn)

Skipa fyri øllum í sambandi við luttøku hjá HS í 25m- og 50m-svimjikappingum, sum ikki eru í Havn, s.s. ferðing, flutningi, innkvartering, innkeyp og matgerð. Taka ímóti gjaldi frá luttakarunum, og avrokna við kassameistaran. Harafturat syrgja fyri, at minst trý hjálparfólk eru til sjálva svimjikappingina, og at minst fimm foreldur eru at hjálpa til, har svimjararnir eru innkvarteraðir.
**MANGLAR - her er skilagott at hava foreldur úr øllum liðunum: Blá og Reyð – evt. Grøn!**